# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Føroyskt er ikki sangbært



*Føroyska fløgan hjá Teiti Lassen fær sum heild góð ummæli í donsku miðlunum*
*Savnsmynd*

**Káta Hornið hjá Teiti verður í hesum døgum givin út í Danmark, og tá besta songrøddin í Danmark gevur fløgu út, eru miðlarnir skjótir at ummæla hana, og fløgan fær sum heild rættiliga jalig ummæli, hóast ein ummælari ikki metur føroyskt vera eitt serliga sangbært mál**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Teitur vann fyrr í ár heiðurslønina við Danish Music Awards, sum besti danski sangari. Hann fekk heiðurslønina handaða í summarhúsinum har hann var í ferð við at taka fløguna Káta Hornið upp, nú er føroyskt mælta fløgan givin út í Danmark. At besta danska sangrøddin í gevur fløgu út á føroyskum fyllur nógv í teimum nógvu ummælunum, ið verða prentað í donskum bløðum í hesum døgum. Í ókeypis tíðindablaðnum Urban, skrivar ummælarin undir yvirskriftini ”Færøerne 1 - Danmark 0” soleiðis um Teit: “Hvilken utaknemmelighed! I marts vandt han den prestigefyldte grammy som ’Årets danske sanger’ foran Simon Kvamm og Thomas Helmig, og nu har han indspillet sit nye album – på færøsk! Men sådan er de tilsyneladende, beboerne på de 18 vulkanøer langt oppe i Nordatlanten; egenrådige og stolte.” Hann heldur tó fløguna vera góða, og gevur henni rættiliga jaligt ummæli. Hann sigur, at tá tú sum lurtari ikki skilur orðini, setur hetta stór krøv til løgini, ið ikki øll liva upp til hesi krøv. Men at onnur teirra eru millum bestu løg, ið Teitur hevur skrivað.

Ummælarin hjá Berlingske Tidende dámar eisini væl fløguna, men fyri hann er málið ein uppaftur størri trupulleiki. Undir heldur misvísandi yvirskriftini “Nyt fra islandske Teitur” fær fløgan eins og hjá Urban fýra av seks stjørnum. Ummælarin nevnir annars fleiri ferðir, at Teitur er føroyingur, so tað kann vera, at tað heldur er ein eitt sindur ov sjuskutur redaktørur, ið hevur smíða yvirskriftina. Ummælarin er ikki fjeppari av føroyskum og skrivar soleiðis: »...så er færøsk nok et smukt sprog, men vanvittigt sangbart, det er det ikke. og det kan selv en så fremragende melodimager og dybtfølt sanger som Teitur ikke gøre meget ved.« Ummælarin heldur tó, at Teitur ger sítt besta, og heldur fram. »Heldigvis er musik et universelt sprog, og et sprog som Teitur i høj grad mestrer. Han evner at få ufattelig smukke stemninger ud af sin akustiske guitar og den stemme, der bare borer og borer sig ind i hjertekulen på lytteren.« og endar við teirri niðurstøðu, at hetta ikki er eitt meistaraverk men ein vøkur fløga.

Ummælarin hjá Ekstra Bladet, hevur minnið trupulleika við málinum og skrivar í greinini “Følsom færing” soleiðis: “I forhold til sidste års fine succesalbum ’Stay Under The Stars’ nynner troubadouren nu på modersmålet med sin uspolerede røst, og selv om man ikke fatter et ord af ’Káta Hornid’, så flimrer det med falmede billeder af vemod, hjemve og knugende kærlighed på nethinden.” Eisini hesin ummælarin gevur fløguni fýra av seks stjørnum. Eitt sindur verri er skoðsmálið, ið Teitur fær hjá Gaffa.dk. Har verður fløgan skýrd eitt fríkorter hjá føroyska trubadurinum. Ummælarin skrivar soleiðis

»Káta Hornid er ellers et sjældent homogent udspil fra det inspirerede rodehoved Teitur. Kun kvaliteten af melodimaterialet svinger lovligt meget på et album, hvor sprogbarrieren desværre sætter sine begrænsninger. I folk og singer-songwriter er lyrikken per tradition omdrejningspunkt, og på Káta Hornid misser ikke-færinger en stor del af substansen«

Besta skoðsmálið fær Teitur í ókeypis tíðindablaðnum Metro Express, ið gevur Teiti fimm av seks stjørnum, og niðurstøðuni: “Man kan fornemme, at Teitur ved at nedtone udskejelserne bevidst tvinger lytteren til at lade sig forføre af det, som er hans største talent: smukke melankolske melodier.”

Starvsfólk til:
INTERSPORT
Tórshavn

**Søkt verður eftir lærlingi til Thomas Dam ítrótt í Tórshavn.**

Starvið fevnir um alt vanligt handilsarbeiði innan sølu av ítróttarútgerð. So ert tú ein m/k, sum hevur áhuga innan hetta økið, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð hjá okkum

Thomas Dam Ítróttur er partur av Intersport- og Sport Direct samtakinum og hava vit 3 ítróttarhandlar. Umframt handilin í Tórshavn hava vit eisini ein á Glyvrum og ein í Klaksvík.

So ert tú ein fryntlig/ ur persónur við áræði og ikki ert bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur ert tú vælkomin at søkja hetta læru-pláss. Lærutíðin er 2 ár við HH prógvi og 3 ár við FHS prógvi.

Umsóknir við prógvum og viðmælum verða at senda til:

***Thomas Dam Ítróttur***
***Niels Finsensgøta 5***
***Boks 268***
***FO-110 Tórshavn***

P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTUR
Niels Finsensgøta 5 · boks 268 · FO-110 Tórshavn

# G!ott føroyskt á G!

**Á heimasíðuni hjá G!Festivalinum kunnger festivalurin í dag, eina stóra og fjøllbroytta greipu av føroyskum tónleikanøvnum**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*




*Gunnar G. Guttesen verður eitt av føroysku nøvnunum á G!Festivalinum*
*Mynd: Ólavur Frederiksen, FaroePhoto.com*

G!Festivalurin skelkar neyvan nakran við meginpartinum av sínum avdúkingum í dag, fastir gestir sum Kári Sverrisson, 200, Gestir og Høgni Lisberg, vóru longu spáddir luttøku. Flemming Petersen hevur givið fløgu út á G!Music og Deja Vu vann GBOB kappingina, ið G!Music skipar fyri, so hesi nøvn vóru eisini í væntu.

Martin Joensen hevur eisini seinnu árini verið vanligur gestur á pallinum í Syðrugøtu. Einasta navnið, ið var eitt sindur óvæntað er Gunnar G. Guttesen, ið á Asfalt átti eina av teimum bestu framførslunum, og uttan iva er eitt gott íkast til G! skránna. Festivalurin lýsir Gunnar á hendan hátt: „Ein blanding av Stevie Wonder, Jeff Buckley, Queen og Keith Green, kryddað við einum sindri av Muse, Koinonia, Toto og Weather Report til tíðir – men alla tíðina púra Gunnar Guttesen.“